## DAGSINS MEINING

# Raðfestið av nýggjum

Fíggjarlógaruppskotið er ikki gott. Tann politiska raðfestingin er ov vánalig, og eisini er tað fullkomuliga ábyrgdarleyst, bevíst at halda lógarfestar útreiðslur uttanfyri fíggjarlógini.

Útreiðslusíðan er ivaleysa stór, hóast okkurt øki við øðrvísi raðfesting kundi fingið væl meiri á fíggjarlógini. Vilhelm Johannesen hevur til bæði hesa og seinastu fíggjarlógarviðgerð, gjørt vart við ein ótálmaðan vøkstur í kostnaðinum av umsitingini. Uppundir val tosa politikarar eitt sindur um hetta, men so tykist tað verða gloymt. Tað er ein sannroynd, at ongantíð eru útreiðslurnar til almenna umsiting øktar so nógv, sum undir Annfinn Kallsberg. Føroyingar hava snøgt sagt ikki ráð til at hava eina miðfyrisiting, ið fer at tátta í hálvtannaðhundrað milliónur í rakstri um árið.

Umsitingin er styrkt seinastu árini hoyrist mangan. Hvat er vorðið betur? Gamaní kann man siga, at almennu útreiðslurnar verða betur kontrolleraðar, men hvat er vunnið, um man betalir fleiri ferð spardu upphæddina í árligum rakstri.

Tað ber til at missa pening úr lummanum. Um man vil tryggja, at man ongan pening missir burtur á hendan hátt, so kann man betala einum manni at ganga aftanfyri seg og heinta upp, so hvørt. Hetta er sjálvandi eitt deyðføtt hugskot, tí ein og hvør dugir at síggja, at tað, man sparir fer fleiri ferð út aftur í løn til mannin.

Umsiting skal til, og hava vit nógv góð fólk, ið gera sítt besta til dagligt í umsitingini. Trupulleikin er ein skeivur bygnaður, og kann einstaka starvsfólkið ikki lastast fyri tað. Ábyrgdina av hesum hevur politiska leiðslan, og hevur hon ikki verið sína uppgávu vaksin. Tað eru fleiri ár síðani, at spurnartekin varð sett við Finn Norman Christensen bygnaðin, ikki minst á hesum stað.

Um, man spardi t.d. 1/3 av umsitingarkostnaðinum hjá landinum, so var ivaleyst av peningi til at sloppið undan mannminkandi støðuni, har man sker á sjúkrahúsverkinum, soleiðis, at standurin er verri, enn hann var í svárastu kreppuárum, tá spart var av neyð. Bíðilistar í heilsuverkinum eru ein skomm, ið kom í ringastu kreppu, men í dag gerast teir longri í bestu árum. Teir stovnar, ið veita eina beinleiðis tænastu til borgaran áttu at fingið fyrst, og so sá man, hvussu nógv var eftir til umsiting. Tað hevði noytt umsitingina at hugt at felags innkeypi, felags løgdeild o.s.fr. Eitt er vist, og tað er, at núverandi útreiðslustøðið til almenna umsiting kann ikki halda fram.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Sjálvstýrislandsstýrið byggir sín fíggjarpolitikk á danskan blokk

**Helgi Abrahamsen**



Fíggjarlógaruppskotið fyri 2003 vísir, at samgonguflokkarnir hava harliga brúk fyri blokkstuðlinum úr Danmark. Av teimum 630 mió. krónunum, sum landskassin skal hava úr danska ríkiskassanum í komandi ári, skulu heilar 628 mió. krónur nýtast til rakstur, íløgur og avdráttir av lánum, meðan bert 2 mió. krónur verða settar á bók.

Ja so týdningarmikil er blokkstuðulin fyri samgonguflokkarnar, at teir hava slept tí gamla ynskinum um at minka blokkin burtur, og hava ístaðin "fryst hann fastan", sum tað nú eitur. Hetta, siga teir, skal gera blokkin til ein alsamt minni part av føroyska búskapinum so hvørt sum búskapurin veksur (um hann veksur). - Men hvat nú um búskapurin ikki veksur, ella verður fyri afturgongd? Ja so verður tann fastfrysti blokkstuðulin ein alsamt størri partur av samlaða føroyska búskapinum, men tað má eitt sjálvstýrislandsstýri sjálvsagt ikki nevna. Tá er betri at "meta at búskaparvøksturin heldur fram".

**Mangt er broytt síðani 2001**

Tá yvirtøkulógin var til 1. viðgerð í løgtinginum í august í fjør segði Høgni Hoydal millum annað soleiðis: *"Eg havi sagt tað fyrr, eg kann endurtaka tað, at tann størsti vandin fyri føroyskan búskap, eftir mínum tykki, er at man ikki minkar blokkstuðulin, men at man í staðin í populismu gyklar fólki fyri at man kann brúka nakrar pengar, sum vit ikki hava trygd fyri, til pensjónir og hvørt av sínum. Sjálvsagt skulu allar okkara vælferðarskipanir, pensjónir og annað fíggjast við okkara egnu inntøkum, tað er tað einasta trygga frameftir."*

Nú er fíggjarlógaruppskotið fyri 2003 komið. Blokkstuðulin minkar ikki, og pengarnir, sum vit "ikki høvdu trygd fyri" í 2001 eru kortini á ein ella annan hátt "frystir fastir". Hesir pengarnir eru nú við til at fíggja okkara vælferðarskipanir, sum annars skuldu fíggjast við "okkara egnu inntøkum", tí tað skuldi vera tað "einasta trygga frameftir". Blokkstuðulin verður ikki settur á bók, sum Karsten Hansen annars vildi vera við fyri einum ári síðani, og útreiðslur landskassans eru øktar heilar 944 mió. krónur síðani 1998.

- Ja skjótt broytist í okkara lítla samfelag, hvørs leiðarar einaferð ætlaðu at taka fullveldi.

# Pipar & Salt aftur í studio

TÍÐINDASKRIV
*Vegna Pipar & Salt/ Sjúrður Skaale og Jákup Veyhe*

Sjúrður Skaale og Jákup Veyhe, sum í 1998 góvu út fløguna Pipar & Salt, fara nú aftur í studio at spæla inn nýggja fløgu.

Talan verður ikki um eina tónleikafløgu í vanligum týdningi, men eina fløgu, sum er ein samanrenning av fleiri listargreinum.

Fløgan kemur væntandi út til jóla.

# Frá Hondbóltssambandi Føroya

**Broyttir dystir í 1.deild monnum og kvinnum fram til 06.11.02 vegna manslandsliðið, ið fer til Grønland og er burtur 27.10-02.11**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Mikudagur | 13.11.02 | A 116 H71-StÍF | 1d. menn | 20.00 | Hoyvík |
| **(fluttur aftur frá 30.10)** | | | | | |
| Sunnudagur | 20.10.02 | A 111 Neistin-Tjaldur | 1d menn | 16.00 | á Hálsi |
| **(fluttur aftur frá 16.10, so dysturin liggur beint eftir dystin hjá kvinnunum.)** | | | | | |
| Sunnudagur | 20.10.02 | A 115 StÍF-VÍF | 1d menn | 16.00 | Skála |
| **(fluttur fram frá 27.10)** | | | | | |
| Mikudagur | 23.l0.02 | D 114 Kyndil-Tjaldur | 1.d kvinnur | 18.30 | Hálsi |
| **(fluttur fram frá 27.10)** | | | | | |
| Mikudagur | 23.10.02 | A 114 Kyndil-Tjaldur | 1d menn | 20.00 | Hálsi |
| **(fluttur aftur frá 16.10)** | | | | | |
| Sunnudagur | 03.11.02 | A 119 KÍF-VÍF | 1d menn | 16.00 | Hoyvík |
| **(fluttur aftur frá 02.11)** | | | | | |
| Sunnudagur | 03.11.02 | D 117 Kyndil-VB | 1d kvinnur | 17.00 | Hálsi |
| **(fluttur aftur frá Hoyvíkshøllini kl 14.30)** | | | | | |
| Sunnudagur | 03.11.02 | A 120 Kyndil-H71 | 1d menn | 18.30 | Hálsi |
| **(fluttur aftur frá Hoyvíkshøllini kl. 16.00)** | | | | | |
| Mikudagur | 06.11.02 | A 117 Tjaldur-KÍF | 1d menn | 20.00 | Runavík |
| **(fluttur aftur frá 30.10)** | | | | | |
| Mikudagin | 06.11.02 | A 118 VÍF-Kyndil | 1d menn | 20.00 | Vestmanna |
| **(fluttur aftur frá 30.10)** | | | | | |

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

ítróttur

Nr. 197 • týsdagur • 15. oktober 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Venjarin: Vit vóru ov seinir í gongd

**Henrik Larsen var ikki nøgdur um føroyska avrikið fyri steðgin, men hann var tó glaður um, at liðið reistist somikið væl, sum teir gjørdu**

LITAVA-FØROYAR
*Jákup Mørk*
*Álvur Haraldsen*



*- Misnýtir tú slíkar møguleikar í altjóða dystum, so kostar tað, heldur Henrik Larsen, sum harmast um, at bólturin ikki vildi í kassan síðstu løtuna*

**KAUNAS:** Lagið á Henrik Larsen man onkuntíð hava verið betri, enn tað var eftir landsdystin móti Litava. Føroyska liðið hevði í einar tríggjar fjórðingar av dystinum verið niðurspælt av litaviska landsliðnum, og hetta var venjarin eisini skjótur at ásanna, tá fjølmiðlafólkini eftir dystin royndu at fregnast, hvat hann helt um dystin.

Og hann ásannði eisini, at litaviska liðið hevði uppiborið sigurin.

- Vit spældu í dag ímóti einum liði, sum er nógv betri enn skotska liðið, sum vit møttu fyri einum mánaði síðani. Ta ferðina komu vit alla tíðina fram til møguleikar, men tað høvdu vit sera ilt við at gera hesaferð, helt hann fyri, men hann ásannði kortini, at føroyska liðið eisini hevði havt havt sínar møguleikar.

- Sjálvandi høvdu vit tað. Hasa seinastu løtuna er tað ov vánaligt, at vit ikki skora, tí misnýtir tú slíkar møguleikar í altjóða dystum, so kostar tað. Tað vita bæði eg og leikararnir, og tí er tað stórt spell, at vit brenna slíkar møguleikar.

### Dómarin hjálpti

Um sjálvan dystin segði Henrik annars, at hann roknaði við, at trýstið á føroyska málið fór at verða stórt, og serstakliga lat hann illa at fyrstu 20 minuttunum, sum mest sum bert vórðu spældir eftir hæli, men hann harmaðist kortini um brotssparksdómin, sum viðførdi fyrsta málið hjá Litava.

- Eg veit ikki, hvat hann dømir fyri, og tað haldi eg heldur ikki, at spælararnir gjørdu. Yvir høvur haldi eg, at dómarin als ikki var okkum til vildar, og tað var eisini nakað, sum eg segði, tá eg sá, at talan skuldi vera um ein jugoslaviskan dómara. Hinvegin er tað nokk ikki so nógv, sum vit fáa gjørt við tað. Summar dystir hevur tú góðar dómarar og aðra tíðir ikki, og tað mugu vit so bara arbeiða útfrá.

- Eg skal tó leggja afturat, at eg eri væl nøgdur um hugburðin hjá leikarunum, tá vit fóru inn til seinna hálvleik. Teir vístu tá, at fyrri hálvleikur als ikki hevði verið nóg góður frá teirra síðu, og við eitt sindur av hepni kundu vit kanska eisini vent dystinum, men tað krevur so, at tú skorar nøkur mál, og tað gjørdu vit ikki. Kanska skuldu vit til komandi venjingarnar roynt at latið spælararnir skotið frá málstrikuni, og vita, um teir fingu bóltin inn, sigur hann hálvsmílandi.

### Skulu spæla í 90 minuttir

Onkur vildi kanska róð uppundir, at ein orsøk til trýstið, sum føroyingarnir komu undir, er 4-4-2 spælskipanin, har spælið skal flytast longur niðan á vøllin, men hesum vildi Henrik Larsen als ikki taka undir við.

- Sjálvandi kundu vit valt at spæla meira defensivt, men eg rokni við, at hatta liðið nokk hevði skorað móti okkum kortini, og so er tað altso stuttligari, um tú sjálvur kanst spæla eitt sindur frameftir.

Í seinna hálvleiki vístu vit jú eisini, at vit megnaðu at spæla upp til hinar. Allir sum ein lyftu leikararnir seg, og sum sagt eri eg væl nøgdur við tað. Men vit mugu ásanna, at hugburðurin skal verða tann rætti í 90 minuttir, um vit skulu fáa nóg nógv burturúr. Í øllum førum fáa vit trupulleikar móti Týsklandi, um hugburðurin ikki verður betri enn tað sama, segði Henrik Larsen heldur speiskliga at enda.

# Klárt til stórdystin



*Føroyska fótbóltslandsliðið kom til Hannover sunnudagin, og komandi dagarnar fara teir so at fyrireika seg til størstu ítróttarligu avbjóðingina, sum føroyska fótbóltslandsliðið hevur havt*

**Í morgin fer føroyska landsliðið undir sína størstu avbjóðing nakran tíð, og spenningurin kring hetta tykist vera stórur**

TÝSKLAND-FØROYAR
*Jákup Mørk*
*Álvur Haraldsen*

**HANNOVER:** Flogfarið hjá Atlantic Airways við fótbóltslandsliðnum og einum 40 viðhaldsfólkum settist tíðliga seinnapartin sunnudagin í Hannover, har føroyska ferðalagið skal halda til komandi dagarnar.

Í mun til dystin í Litava er einki at ivast í, at áhugin fyri hesum dystinum er munandi størri. Sum sagt, so vóru eini 40 viðhaldsfólk við á ferðini í Litava, men hetta talið verður fleirfalda komandi dagarnar. Longu sunnukvøldið kom eitt leiguflogfar frá Atlantic Airways til Hannover, og umframt hetta eru eisini mong, sum leggja leiðina framvið Danmark á vegnum. Bussferðir í hópatali eru fyriskipaðar úr bæði Keypmannahavn og Jútlandi, og roknað verður við, at eini 500 føroysk viðhaldsfólk verða á staðnum, tá dysturin verður blástur ígongd.

Eisini í týsku miðlunum er áhugin fyri dystinum stórur. Mest sum øll tey stóru bløðini hava seinastu vikurnar havt rúgvusmikið tilfar um Føroyar og føroyskan fótbólt, og hóast tey sjálvandi rokna við einum sigri, so verða ávaringartekin av ymsum slag send út. Ikki minst mundi hepni javnleikurin hjá skotum í Føroyum gera sítt til, at so er.

# John kennist ikki við brotssparkið

**John Petersen dugdi illa at síggja nakra orsøk fyri, at dómarin skuldi døma brotsspark, tá hetta varð gjørt**

LITAVA-FØROYAR
*Jákup Mørk*
*Álvur Haraldsen*

**KAUNAS:** Tað var John Petersen, sum varð gjørdur til »syndara«, tá jugoslaviski dómarin leygardagin dømdi brotsspark til Litava.

Tá vit eftir dystin hittu John, segði hann tó, at hann hevði ilt við at skilja hesa avgerðina:

- Eg veit ikki ordiliga, hvat hann dømdi fyri. Linjuverjin segði, at eg hevði togað í troyggjuna á einum leikaria, og dómarin segði meg hava trýst hann, so eg veit ikki ordiliga, men hatta var so ikki brotsspark.

- Tað kann kanska vera, at hann bar í bøtuflaka fyri hendingina beint áðrenn, tá hann ikki dømdi, men undir øllum umstøðum var hatta keðiligt. Vit vóru akkurát um at koma so spakuliga fyri okkum, og tí var tað sera tungt at fáa eitt slíkt mál ímóti sær, segði John Petersen at enda.



*- Linjuverjin segði, at eg hevði togað í troyggjuna á einum leikara, og dómarin segði meg hava trýst hann, so eg veit ikki ordiliga, men hatta var so ikki brotsspark, sigur John Petersen*